# Savna fløskur fyri festival

**Tensingkórið í Havn byrjar í morgin eina innsavning av fløskum, nú kórið ætlar sær til Danmarkar í summar**

KÓR
*Snorri Brend*

**Havn:** Ein av døgunum í hesi vikuni er ikki óhugsandi, at fólk í Havn fáa vitjan av nøkrum ungum sangfuglum.

Hetta eru limir í tensingkórinum ”Sound of Glory”, sum fara at ganga hús úr húsi til hetta endamálið.

Ætlanin er, at teir 40 limirnir í kórinum skulu fara á ein festival í Danmark í summar. Her fáa tey høvið at hitta eini 2000 aðrar sangfuglar úr øllum Europa.

Festivalurin kallast European TenSing Festival og verður í Århus beint eftir ólavsøku.

Á hesum festivalinum verða nógvar konsertir, og tað er í hesum sambandi at Sound of Glory skal umboða Føroyar.

Hetta er ikki fyrstu ferð at kórið ger hetta tiltakið við innsavningini. Hetta varð roynt í fjør við sera góðum úrsliti.

Sagt verður, at tey fara at ganga hús úr húsi, og at fólk annars eru vælkomin at ringja til kórið - tlf. 260442 – og so verða fløskurnar avheintaðar heima hjá fólki.



*TenSing-kórið ”Sound of Glory” gongur ótradisjonellar leiðir til tess at savna inn pening til Danmarkarferð í summar*


norden



YGGDRASIL 25 ÁR
Jubileumskonsert í Norðurlandahúsinum
Sunnudagin 15. januar 2006 kl. 16.00

Eivør Pálsdóttir
Annika Johannesen
Tore Brunborg • Mia Káradóttir
Heðin Ziska Davidsen • Kristian Blak
Anders Jormin • Brandur Jacobsen

15. januar er føðingardagur hjá Williami Heinesen, sum hevði stóra ávirkan á tónleikin hjá Yggdrasil tey fyrstu árini. Verkið DEN YDERSTE Ø – sum eisini verður framført hetta kvøldið, er tónleikur við recitation av yrkingum eftir Williami Heinesen.

Atgongumerkið til konsertina er ein fløga við upprunaútgávuni við Den Yderste Ø frá 1981. Atgongumerkið til konsertina kostar 125,- íroknað fløguna, og fæst í húsinum.

NORDENS HUS PÅ FÆRØERNE
NORÐURLANDAHÚSIÐ

Norðari Ringvegur • 100 Tórshavn • Tlf. 317900 • Fax 319790 • www.nlh.fo


# Hanus, Karl Martin, Anna Maria og Aldubáran í Klingruni



*Hanus og Aldubáran eru framúrskarandi saman*

*Mynd: Símun Jóannesarson*

**Høvi verður at hoyra nakað av tí besta innan klassiskan tónleik og vísusang, tá Aldubáran og Hanus Johansen, Karl Martin Samuelsen og Anna Maria Olsen fara at føra fram í Klingruni**

KONSERT
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Aldubáran og Karl Martin Samuelsen, Anna Maria Olsen og Hanus G. Johansen spæla konsert í Klingruni í Norðurlandahúsinum sunnudagin 22. januar, kl. 19.00.

**Norðurlendsk konsertferð**

Konsertin hjá Aldubáruni í Føroyum er partur av einari norðurlendskari rundferð, ið Aldubáran hevði seinast í oktober í ár. Spælt varð í Oslo, Keypmannahavn og Århus. Nú enda tey so rundferðina í Føroyum við einari konsert í Norðurlandahúsinum.

**Tvær konsertir**

Konsertin er býtt upp í tveir partar, seinna part við Hanusi og fyrra part við løgum, ið Páll Sólstein hevði skrivað til yrkingar eftir Christian Matras, William Heinesen, Hans Andrias Djurhuus og Steintór Rasmussen. Í hesum parti av konsertini syngja Anna Maria Olsen og Karl Martin Samuelsen.

**Sannførandi uppliving**

Á konsertini á Norðuratlants Bryggjuni í oktober var talan um eina sera góða konsert, serliga í tí partinum har Hanus sang. T.d var framførslan av lagnum Timburmenn var so sannførandi, at upplivingin var vemmilig og lekkur í senn.

Tey bæði fyrstu løgini á konsertini vóru Marita og Saknur. Hesir báðir klassikararnir í føroyskum tónleiki umboða nakað av tí stuttligasta og tí vakrasta bæði hjá Poul F og hjá Hanusi. Í tí hami, ið Aldubáran gav løgunum gjørdust hesir eginleikar eitt sindur týðiligari.

Marita var enn stuttligari við tí eitt sindur svaka klassiska tónleikinum undir, og Saknur var enn vakrari kýndur út úr teimum klassisku ljóðførunum. Konsertin var ein ferð í lagaskattinum hjá Føroya ivaleyst største vísusangara.

**Framúrskarandi samstarv**

Røddin hjá Hanus er ein tann mest gandakenda og bergtakandi føroyska sangrøddin. Í Aldubáruni hevur Hanus funnið ein bólk, ið megnar at liva upp til heiðurin at spæla við honum. Saman eru Hanus og Aldubáran framúrskarandi.

Atgongumerki fáast í Norðurlandahúsinum og Kunningarstovuni í Havn og Runavík

**Tónleikarar:**
Hanus G Johansen.
**Tónleikarar:**
**Sang:** Karl M. Samuelsen, Anna Maria Olsen og Hanus G. Johansen
**Klaver:** Stamen Stanchev
**Bass:** Arnold Ludvig
**Guitar:** Ólavur Jakobsen
**Horn/klaver:** Páll Sólstein
**Trombon:** Andras Olsen
**Trompet:** Ólavur Olsen
**Floyta:** Andrea Heindriksdóttir
**Fagot:** Jógvan Zachariasen
**Klarinet:** Anna Klett
**Violin:** Angelika Nielsen